

# Vikuskiftistúrur til **London**

## Dagur 3 av 4

Hvat er betur enn ein vikuskiftistúrur til London við vinkonuni? Vit eru farnar til London hetta vikuskiftið við teirri vón at uppliva ymiskt, sum vit ikki hava møguleika til í okkara annars so deiliga landi. Vit vóna at uppliva ymiskt, bæði hvat viðvíkur mentan, søgu, shopping, býarlívi og ikki minst tey áhugaverdu og fjølbroyttu matstøðini, sum tann sera metropoliski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Møguleiki er fyri at lesa um okkara vikuskiftistúr í Sosialinum hvønn dag í vikuni, og vónandi er tað ein inspiration til aðrar føroyingar sum leingast eftir nýggjum og øðrum upplivingum.

## SIGHTSEEING Í LONDON

London hevur so ótrúliga nógv at bjóða, bæði hvat viðvíkur mentan, søgu, arkitekturi og ymiskum sum nú einaferð hugtekur ein ferðandi. Um ein ynskir at síggja alt, sum býurin hevur at bjóða, so er neyðugt at steðga í fleiri dagar, um ikki vikur. Men sjálvt upp á ein dag kann man fáa nógv burturúr, um man dugir at leggja sær dagin tilrættis og veit, hvat man vil og nær.

## SIGHTSEEING VIÐ BUSSI

Tá ið nú býurin hevur so nógv ymiskt at bjóða, so kann tað tykjast trupult at náa alt, sum man jú fegin vil, upp á einans fýra dagar, sum hjá okkum. Í dag ætlaðu vit at vitja tey støð og bygningar, sum London er kendur fyri. Áðrenn vit fóru frá hotellinum, lótu vit okkum í góðar skógvar, tí vit væntaðu, at hetta fór at gerast ein strævin dagur fyri føturnar við nógvari gongd.

Men her, eins og á so nógvum øðrum økjum, hava bretar eina framúr góða tænastu ferðafólki at frama. Ístaðin fyri at ganga frá einum staði til annað, ið kann verða strævið í øllum hitanum, so bjóða teir sightseeing við bussum. Vit valdu at brúka hesa góðu tænastu. Vit keypa eitt atgongumerki fyri 250 kr. á Viktoria Station, sum eisini kann til dømis keypast á Leiceister Square og aðrastaðni, og hetta vísti seg at verða væl givnir pengar. Bussarnir eru dupultir bussar, har ovara hæddin er opin, so væl liggur fyri at taka myndir. Bussarnir koyra síðani runt til øll tey søguligu støð, ið gera London serstakan. Umframt at ein kemur til hesi frálíku støð, so fær man eisini søguna at vita um hvørt ávíst pláss.

Ein kann annaðhvørt lurta eftir ferðaleiðaranum ella koyra ein oyrasnigil í oyrað fyri at síðani at velja frásøguna á átta ymiskum málum.

Írroknað í kostnaðinum er eisini ein frálíka góður túrur við báti oman eftir Thamsen ánni og tríggjar ymiskur gongurtúrar við ferðaleiðara. Atgongumerkið er virkið í 24 tímar, og ein kann hoppa uppí og úr bussinum, sum einum lystir.

## BUCKINGHAM PALACE

Vit setta okkum á aðru hædd í bussinum og mugu ásanna, at útsýnið var bergtakandi. Tá vit komu til Buckingham Palace, valdu vit at fara av bussinum og hyggja nær at hesum stórligna bygningsvirki.

Á júst hesum degi kundi Elisabeth drotning hátíðarhalda 57 ára dagin, síðani hon tók við bretsku krúnuni, og vóru sostatt nógv fólk savnað fyri at síggja hana. Tíðanverri vóru vit nakrar minuttir ov seinar, og vit sóðu einans nakrar flottar bilar koyra avstað og ein rúgva av politistum og vaktum.

## LONDON EYE

Tá eyguni vóru mettað, fóru vit í annan buss, ið leiddu okkum til støð sum Trifalgar Square, Westminster Abbey, Big Ben, Tower of London, Tower Bridge, Saint Paul's Cathedral og London Eye, sum er ein karrusel . Vit brúktu hetta høvið til at síggja London frá erva av og keyptu okkum atgongumerkið á áleið 150 kr. Røðin til at keypa atgongumerkið til London Eye var rættiliga long, men hetta var ein avbera góður túrur og vert bæði bíðitíð og kostnað. Samanumtikið er bussurin avgjørt eitt sera gott alternativ til at síggja London. Við at sita afturá og njóta sólina, høvdu vit, eftir bert trimum tímum, upplivað alt tað, ið vit bæði ynsktu at síggja og hoyra um London.

Ætlar tú tær ein familjutúr til London, so er hetta eitt sera gott tilboð at taka brúk av. Børn tíma væl at sita í tílíkum opnum bussi, sigla oman eftir Tamesen og ikki minst njóta túrin í 135 m. høga London Eye, ið gevur frálíkt útsýni yvir allan býin.

Meira kann lesast um London á næstu síðu og annars á www.visitlondon.org

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við teldupostí
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo